# 100 ára dagurin hjá Diinum

Sum greitt frá í Miðvikunu seinast varð Andreas Djurhuus, Diurin, ættaður úr Porkeri, 100 ár hósdagin. Vit vóru sjálvsagt við. Tað vóru nógv fólk, og tað vóru eisini nógvar talur. Diurin var sera væl fyri og hugnaði sær alla tíðina við sínum gestum. Tað skal vera nevnt, at tað var ein lítil skeivleiki í umrøddu grein. Har tað stendur Mýlingsgrunnurin skuldi sjálvsagt staðið Munkagrunnurin.

Vit hava nakrar myndir frá føðingardegnum

**ó.**



*Diurin og løgmaður fingu eitt fitt prát saman*



*John, Andreas, Linda og Bjarta vóru øll errin av sínum gamla men tó unga langabba*



*Kára er abbadóttir Diin. Hon er júst gift við Daniel Milan, sum er listarmaður. Meira fæst at vita um hann á heimasíðuni. www.danielmilan.com. Tey bæði fara fyrsta dagin til Uganda, har Kára skal arbeiða fyri UNFPA, sum er ein heilsustovnur hjá ST*



*Diurin saman við sínum tannlækna Margit Svarrer. Hann var hjá henni beint áðrenn føðingardagin. Margit heldur, at tenninar hjá Diinum eru so góðar, at tær í øllum góðum fara at halda hann av!*



*Rosa Samuelsen, Heðin Mortensen og Henrik Old hildu øll røðu*



*Páll Horn t.v. hevur siglt hjá Diinum, og Otto Dam gjørdi Diurin til trolmann, sum greitt frá í Miðvikuni*



*Millum gestirnar vóru Annika Olsen og mamma hennara Marna*



*Systrarnar Sigrid og Elsa í Skemmuni í Porkeri. Diurin var systkinabarn mammu teirra*